**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Á G4 eru hesi størv sum sjúkrarøktarfrøðingar leys at søkja:

- Ein sjúkrarøktarfrøðingur í náttarvakt í starvsbrøki 0,8. Til setan skjótast til ber, fram til 31. januar 2006.
- Vegna barnsburðarfarloyvi søkja vit eftir einum sjúkrarøktarfrøðingi í starvsbrøki 0,8 í blandaðum vaktum, frá 1. mars til 30. september 2005 og ein starvsbrøkur 0,7 í kvøldvakt frá 1. apríl til 31. oktober 2005.
- Ein sjúkrarøktarfrøðing í kvøldvakt, í starvsbrøki 0,7 frá 1. apríl til 30. september 2005.

Deildin er ein kirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopædi, maga/tarm og urologi. Vit hýsa eisini sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, eyga, oyra, nøs og hálsasjúkum. Á deildini er pláss fyri 24 sjúklingum.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4 á telefon 304500, lokal 5064 ella Ceciliu Vestureið leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, e-postur ceci@lsh.fo

**Vit søkja eftir sjúkrarøktarfrøðingi:**

- sum hevur prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- sum hevur fakliga vitan og royndir innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- við fleksibiliteti og góðum samstarvsevnum
- sum er opin og positiv
- sum vil søkja mennandi avbjóðingar

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 14. mars 2005 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merktur "umsókn til starv" við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*

# Frá Nes kommunu

Vegna farloyvi verður søkt eftir fólki at gera reint í Tofta skúla.
Reingerðin er 23,75 tímar um vikuna frá 1. mars at rokna.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og FKA.

Skrivligar umsóknir vera at senda til Nes kommunu, 650 Toftir, í seinasta lagi 28.02.2005 kl. 12.00.

**Nes kommuna**

# Fulltrúi

Eitt starv sum fulltrúi á Búnaðarstovuni verður við hesum lýst leyst til setan eftir nærri avtalu.

Arbeiðsøkið hjá fulltrúanum verður:

- at fyrisita tær uppgávur, sum lagdar eru til Búnaðarstovuna innan aliøkið, og harímillum vera við til at orða og seta í verk innanhýsis reglur og mannagongdir innan hetta økið,
- gera hagtalsgreiningar og almannakunngerahesar,
- virka sum ráðgevi innan aliøkið hjá myndugleikum o.ø.,
- taka sær av øðrum fyri starvið viðkomandi uppgávum.

Av tí, at stovnurin er lítil, kann viðkomandi starvsfólk vænta eisini at skula taka lut í øðrum uppgávum á stovninum eftir tørvi.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava útbúgving frá hægri lærustovni, svarandi til bachelor útbúgving. Harumframt er tað ein treyt, at viðkomandi hevur fyrisitingarligar royndir á økinum ella sum heild innan almenna og/ella privata fyrisiting.
Umsøkjarar við innliti í almenna bygnaðin og politisku skipanina hava fyrimun.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi starv, har umsøkjarin verður við til at byggja upp ein nýggjan stovn og verður við til at mynda karmarnar innan nevnda fyrisitingarliga økið, sum hevur stóran samfelagsligan týdning.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Møguleiki er fyri, at starvsøkið verður víðkað/broytt, og má tann, ið settur verður, tola hetta.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

Búnaðarstovuna
Postrúm 50
FO-110 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 7. mars 2005.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ara Johanneson, tlf. 308030.

**Stutt lýsing av Búnaðarstovuni**
Búnaðarstovan er skipað eftir løgtingslóg nr. 20 frá 17. mai 2004 um landsjørð, og fyrisitur alla almenna jørð, sum ikki er fyrisitin av ella skrásett sum ogn hjá øðrum almennum stovni. Búnaðarstovan umsitur eisini árligu studningsjáttanina til landbúnaðarvinnuna, sum verður veitt við heimild í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003. Somuleiðis er umsitingin av aliloyvum, sambært §§ 2 og 4 í løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski v.m. latnar Búnaðarstovuni at útinna, eins og uppgávan viðvíkjandi aliráðgeving, sum áður hevur ligið hjá Pf. Fiskaaling, er løgd til Búnaðarstovuna.
4,5 heiltíðarstørv eru í løtuni á Búnaðarstovuni.

**BÚNAÐARSTOVAN**

# Rúsdrekkasøla Landsins søkir leiðara til handilin í Miðvági

Starvið sum deildarleiðari á Rúsdrekkasøluni í Miðvági verður við hesum lýst leyst, og vit sóknast eftir kvinnu ella manni at taka við skjótast tilber.

**Um handilin í Miðvági**
Virksemið er í høvuðsheitinum smásøla í handlinum og stórordrar til skeinkistøð, veitslur v.m. Vørumóttøka og avskiping av fløskum er haraftурat ein partur av virkseminum.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitinum**
Leggja til rættis og samskipa arbeiðið í handlinum
Bíleggja vøru
Ymiskt eftirlit og avstemmingar
Starvsfólkamál og -menning
Kundaráðgeving

**Um starvið**
Tú hevur dagliga ábyrgd av handlinum, at hesin verður rikin sambært innanhýsis mannagongdum og sambært lógum og reglugerðum fyri Rúsdrekkasølu Landsins. Eisini ert tú bindilið millum handilin og høvuðsumsitingina. Arbeiðsbyrðan er skiftandi bæði hvat viðvíkur árstíð og dagar í vikuni. Tað er tí umráðandi, at tú dugir at leggja arbeiðið tilrættis.

Starvið er í nógvar mátar krevjandi bæði fysiskt og mentalt, men samstundis mennandi fyri rætta persónin.

**Um persónin**
Tú hevur góð evni at samstarva, ert fyrikomandi, motiverandi og røkin. Eisini vænta vit, at tú hevur hug og evnir til at seta teg inn í nýggj viðurskifti, bæði tá tað snýr seg um vørur og rakstur av einum handli sum hesum.

**Førleikakrøv**
Handilsútbúgving ella líknandi saman við kunnleika til bókhald og EDV.
Førleikakrøvini stytta um upplæringina, men eru ikki ein treyt fyri setan. Vit rokna við at uttan mun til royndir og námsfrøðiligan førleika er ein ávís upplæring neyðug fyri at røkja starvið.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og er flokkað í 4. lfl.

Umsóknarfreistin er 10. mars 2005.
Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jógvan Jacobsen, rakstrarleiðara, tlf. 31 42 77.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til

**Rúsdrekkasøla Landsins**
Postsmoga 3069
110 Tórshavn
Tlf. 31 42 77

Lesið Sosialin - so eru tit við